

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 07 - 2013

# Boripallur í Meksikoflógva í ljósum loga

Triðja dagin á rað er framvegis eldur í einum boripalli í Meksikanska Flógvanum. Talan er um Hercules 265, sum hevur rakt ein lítlan gasslumma undir boring 55 fjórðingar út fyri Lousiana. Partur av pallinum er sokkin saman. Tað er felagið Walter Oil and Gas, sum eigur pallin. Ætlanin er møguliga at bora ein nýggjan brunn, sum kann lætta um trýstið og avloysa verandi brunn. Í løtuni verður vatn sprænt yvir pallin fyri at minka um hitan, soleiðis at hann ikki spreingist í luftina. Allir 44 av manningini sluppu av pallinum í øllum góðum, áðrenn óhappið hendi. Eingin olja er heldur likin út skrivar heimasíðan Energy Voice. Hetta er annar gasslekin í økinum innan fáar vikur. Tað var annars í 2010, at ringasti oljulekin í søguni hendi í júst Meksikanska Flógvanum, tá eldur kom í ein pall hjá BP, sum sprongdist í luftina. 11 mans doyðu, og oljulekin gjørdi stóran skaða á umhvørvið, sum hevur kostað BP tíggjutals milliardir kr. Myndin er frá US Coastguard